## Funnu 3,5 tons av rúsevni

Myndugleikarnir í suðuramerikanska landinum Kolombia hava lagt hald á 3,5 tons av rúsevninum kokain. Løgreglan kom fram á rúevnið í havnarbýnum Buenaventura, og hetta er tann størsti fongurin í Kolombia nakrantíð. Kolombisku myndugleikarnir siga, at teir fingu frænir av teirri stóru mongdini fyri nøkrum mánaðum síðani, men kortini veit løgreglan ikki við vissu, hvør hevði savnað rúsevnið, og tí er eingin tikin enn. Kolombia er heimsins størsti kokainframleiðari, og tað mesta fer til USA og Evropa.




## Triði hvør banki hall

Ein uppgerð hjá danska bankafelagnum vísir, at av 20 teimum størstu bankunum í Danmark hevði triði hvør hall í 2008. Tilsamans høvdu teir 20 bankarnir 23 milliardir krónur í avlopi, men tað talið var fyrst og fremst Nordea fyri at takka, tí bankin hevði 25,5 milliardir í avlopi í fjør. Bankafelagið sigur, at úrslitið hjá øllum 20 bankunum var sum heild meiri enn 60 prosent verri enn í 2007, men felagið leggur afturat, at tað veruliga úrslitið í 2008 var uppaftur verri, tí broyttar roknskaparreglur gera, at virðið á obligasjónum kann frystast ella leggjast oman á eginpeningin.

# Umbyggingin á sjúkrahúsinum byrjað

**Startskotið til stóra kjakið viðvíkjandi byggivinnu og íslandssáttmála kom, tá tað kom fram, at íslendska TG-Verk fekk uppgávuna at umbyggja landssjúkrahúsið. Nú er hetta arbeiði farið í gongd**



*Nú er íslendska TG-Verk byrjað at umbyggja landssjúkrahúsið, men enn eru bara fýra fólk til arbeiðis, tí felagið bíðar eftir tilfari og at sjúklingarnir verða fluttir*

LANDSSJÚKRAHÚS
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Arbeiði, sum íslendska TG-Verk bjóðaði seg at gera, og nú er farið í gongd við umfatar at endurnýggja útsíðurnar og at skifta tekjuna á B-bygninginum á landssjúkrahúsinum.

Tað er hægsti bygningurin.

Tá lisitatiónin var liðug, vísti tað seg, at TG-Verk vóru tríggjar milliónir krónur bíligari enn bíligasta føroyska tilboðið.

Hetta fekk fakfeløgini í Føroyum á kók, og endin varð, at vinnumálaráðið sendi eitt rundskriv til allar almennar stovnar í Føroyum, um at lønardumping ikki skal fara fram. Soleiðis at skilja, at øll, sum gera arbeiði fyri almennu Føroyar skulu fáa løn sambært føroyskum sáttmálum.

Hetta var Sonja Jógvansdóttir úr samtaki ikki heilt nøgd við, hóast tað hjálpir, tí hon kundi hugsað sær, at ein lóg var gjørd, heldur enn eitt rundskriv.

TG-Verk kundi í prinsippinum gjørt av at nýta íslendskar lønir, tí rundskrivið kom aftaná, men fyritøkan boðaði frá, at hon fór at lata lønir sambært føroyskum sáttmálum, hóast lønin í kreppurakta Íslandi er nógv lægri enn lønin í Føroyum.

Nú er hetta arbeiði skotið í gongd.

### Júst byrjaðir

Oskar Gunnarsson, byggifrøðingur hjá TG-Verk, greiðir frá, at teir júst er byrjaðir at arbeiða.

- Higartil hava vit bara sett lyftirnar upp, men annars bíða vit bara eftir, at sjúklingarnir verða fluttir og at fáa tilfarið, sum kemur í mai. Eftir tað fara vit at hava eini 20 fólk til arbeiðis, og tað verða bæði føroyingar og íslendingar, sum fara at arbeiða, greiðir hann frá. Oskar Gunnarsson leggur afturat, at eftir ætlan skulu teir arbeiða frá mai til novembur og so aftur frá mars til novembur í 2010.

- Men tað kann eisini verða, at vit arbeiða víðari í novembur í ár, um tíðarætlanin noyðir okkum til tað, men enn er bara fýra fólk til arbeiðis, so vit eru í veruleikanum í eini bíðistøðu, staðfestir byggifrøðingurin.

Tá umfatandi umbyggingin verður liðug, skal arbeiði sambært tilboðnum kosta umleið 27 milliónir krónur.

# Eysturkommuna nýta 10 milliónir til ráðhús

**Í samanleggingarsáttmálanum hjá Eysturkommunu er eitt av punktunum, at ráðhús skal vera í Norðragøtu, men hetta verður ikki fylgt fyrr enn um trý ár**

RÁÐHÚS
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri tveimum vikum síðani flutti øll umsitingin hjá Eysturkommunu inn í Brimborg við Gøtugjógv, og har verður hon verandi í trý ár.

Hetta samsvarar ikki við samanleggingarsáttmálan í Eysturkommunu, tí í henni stendur, at ráðhúsið skal vera í Norðragøtu. Men tað verður við arbeitt við hesum sáttmálabroti.

- Vit hava sett ein arbeiðsbólk, sum skal kanna møguleikarnar fyri einum nýggjum ráðhúsi í Norðragøtu. Vit hava arbeitt við fleiri møguleikum. Ein er at hava tað har uppi í bygdini, ein er mitt í bygdini og ein er á niðanfyri fótbóltsvøllin, greiðir Jóhan Christiansen, borgarstjóri, frá. Hann veit tó ikki at siga, júst nær arbeiðsbólkurin skal koma við tilmælinum, men hann roknar við, at tað verður áðrenn arbeiði við næstu fíggjarlóg skal byrja.

- Vit hava leiga okkum inn á Brimborg í trý ár, og tá er ætlanin at flyta inn í nýggja ráðhúsið, og hóast tíðirnar ikki eru so góðar, so meta vit tað vera realistiskt at byggja eitt ráðhús fyri eina 10 milliónir krónur, sigur borgarstjórin. Hann leggur afturat, at sjálvandi má ein kommuna hava eitt ráðhús.

- Tað er nokk ongin kommuna, sum ikki eigur eitt hús at vera í, sigur hann.




*Tað verður ikki fyrr enn um trý ár, at høvuðssæti hjá Eysturkommunu verður í Norðragøtu*